# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

**Svarari:** Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

**Evni:** Heimild hjá kommunum at taka tænastugjald

**Spurningur:**

1. Nær fáa kommunur heimild at taka tænastugjald fyri veitingar til summarhús?

**Viðmerkingar:**

Samgongan hevur sett sær fyri at geva kommunum heimild at taka eitt tænastugjald fyri veitingar til hús, tá húsaeigarin ikki býr í kommununi, og í samgonguskjalinum stendur m.a. soleiðis:

> *Heimild verður latin kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi, og at áseta bústaðarskyldu í sambandi við nýggjar kommunalar byggiætlanir.*

Í fleiri kommunum, serliga í nógvum av teimum smærri kommununum, eru nógv hús, har eigarin ikki býr í kommununi. Nógv hús verða brúkt sum summarhús og verða brúkt lutfalsliga nógv, meðan onnur standa tóm stóran part av árinum.

Felags fyri øll hesi hús er, at tey fáa kommunalar tænastur so sum vatnveiting og kloakk, men heimild hjá kommunum er ikki at taka eitt gjald fyri tað.

Fastbúgvandi rinda kommunuskatt og harvið fyri tær tænastur tey fáa, men tey, ið brúka hús sum summarhús, rinda ikki fyri tænastur, sum tey fáa. Fyri nógvar kommunur er hetta ein lutfalsliga stór útreiðsla, serliga í teimum kommunum, har fleiri súmmarhús eru.

Summar kommunur hava av sínum eintingum sett eitt tænastugjald á summarhús, men hava onga heimild at krevja pengarnar inn. Tí er tað tilvildin, sum ræður á økinum, og greiða má fáast á lógarheimildunum.

**Á Løgtingi, 17. oktober 2023**

Sólvit E. Nolsø